# Klávus merkir jólini væl

**Í leikahandlinum Klávus í SMS er ferð komin á, nú tað stundar til jóla, og leikur eru altíð góðar jólagávur**






Tað var 2. mai í 2009, at Klávus lat upp í SMS. Klávus húsast har Baresso áður var.

Í Klávus fáast leikur av øllum slag. Har eru leikur til tey heilt smáu og til eldri. Og kanska eisini til vaksin, tí Klávus hevur eisini spøl, so sum brettspøl og telduspøl.

### Fótbóltskort eru "in"

Í Klávus merkja tey eittnú, at Lego selist væl, eins og Nintendo DS spøl. Og júst nú eru fótbóltskort eisini "in".

Annars kunnu nevnast av merkjum, ið fáast í Klávusi; Bakugan, Gormati, Zhu Zhu, Playmobil, Lego klæði og ymisk spøl.

### Jólini í hondum

Í Klávusi merkist sera væl, at jólini eru í hondum. Nógv er at gera og jólahýrurin er komin.

Handilin er í SMS, har nógv ferðsla er, og ger hetta eisini, at sera nógv fólk kemur framvið og hyggja innar.

- Og leikur eru altíð góðar jólagávur, siga tey í Klávusi.

# Hetta er mín jólasangur



**PROAKTIVUR GUD**

*– Longu fleiri 1000 ár undan Jesu føðing, bleiv hetta proklamerað, so Guð hevur verið totalt proaktivur!, sigur klaksvíkingurin í Vági, Finn Johannesen*

## Finn Johannesen:

*Nú ringja kirkjuklokkur so hátt*

– Hetta er ein sangur, sum gjøgnum seinastu mongu árini er blivin betri og størri fyri meg, sigur Finn Johannesen úr Klaksvík, men sum er búsitandi í Vági.

Hetta er ein sangur, sum á mangan hátt brýtur frá øðrum jólasangum, men har teksturin er so beinrakin og stingur so djúpt, og rakar faktiskt kjarnuna í øllum jólunum.

At sangurin er skrivaður av Símun av Skarði, setur so eisini sín dám á. Tá ið ein kennir til umstøðurnar í avtoftaðu bygdini á Skarði, og hvussu trupult tað var at koma til og frá, og at tá ið hann fekk skaða í beinið, og ikki var førur fyri at røkja hagan, - so fær sangurin eina heilt øðrvísi dimensjón.

Samstundis at vita, at brimið í og umkring Kunoynna kann verða so stórsligið og ógvusligt, ger at sangurin totalt vaknar og setur tingini í størri ljós. Serliga ørindið:

*Ei brim við strond, ei ísur í skor*
*kann Jesusi forða vegin*
*hann stígur inn for fátæks mans borð*
*har lítil er jólagleðin.*

*Ja, Jesus fer í smáttuna inn,*
*blíð orð hann við gomul talar,*
*hann klappar bleiku barnakinn,*
*av himni tá gleðin dalar.*

Tað er jú tað ið jólini snúgva seg um, at Jesus kemur til okkara. Hetta sum í dag tykist lítið sigandi: Fyri fólk við lítlum sjálvsáliti og ongari trúgv uppá egin evnir.

Nei, faktiskt er hetta so nógv nógv størri enn alt hetta - hetta er kjarnin í at liva og vera til, at halda jól.

Jesus er bindiliðið millum tað sum nú er og tað sum kemur... Hetta er ikki ein uppskrift sum bleiv gjørd eftir einari nátt...nei, longu fleiri 1000 ár undan Jesu føðing, bleiv hetta proklamerað... so Guð hevur verið totalt proaktivur!, slær altso Finn Johannesen fast.

## Nú ringja kirkjuklokkur so hátt

*1. Nú ringja kirkjuklokkur so hátt*
*við himmalskum gleðiljóði:*
*Tað stundar móti jólanátt,*
*tá Jesus varð føddur hin góði.*

*2. Nú boðast friður víða um lond,*
*nú verður hin sjúki grøddur,*
*nú losna hørðu syndabond,*
*tí Jesus í nátt varð føddur.*

*3. Tó myrkur fyllir dalar og skørð,*
*og stormurin ýlir í gjáum,*
*so fjakkar Jesus enn á jørð*
*við sínum jólagávum.*

*4. Ei brim við strond, ei ísur í skor*
*kann Jesusi forða vegin;*
*hann stígur inn for fátæks mans borð,*
*har lítil er jólagleðin.*

*5. Ja, Jesus fer í smáttuna inn,*
*blíð orð hann við gomul talar,*
*hann klappar bleiku barnakinn,*
*av himni tá gleðin dalar.*

*6. Um sorgin veg til hjarta títt fann,*
*vár Jesus teg aldri gloymir,*
*og jólaboðið grøða kann*
*ta sótt, tú í barmi goymir.*

*7. Vit ung og gomul halda nú jól,*
*vár Jesus vil øllum hýsa,*
*hann er hin bjarta lívsins sól,*
*um allar ævir skal lýsa.*

*8. Í Betlehem tann sólin upp rann,*
*um heimin hon út mundi leita,*
*at Føroya smáttum veg hon fann,*
*tí tøkk vit tær, Jesus, veita.*

*9. Øll ung og gomul, samlist nú brátt*
*og lýðið á gleðiljóðið:*
*Tað var um halgu jólanátt,*
*at Jesus varð føddur hin góði.*